**KRABBAMEINSFELAGIÐ**

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
FO-110 Tórshavn

Telefon: 31 79 59
www.krabbamein.fo
T-post: kmf@krabbamein.fo

krabbameinsfelagið

# Prostatabólkurin

Bólkur fyri menn, sum hava ella hava havt krabbamein í prostata



Krabbameinsfelagið
*Umsorgan fyri tær*

1. februar 2019

## EIN BÓLKUR FYRI MENN

Prostatabólkurin er ein bólkur fyri menn, sum hava ella hava havt prostatakrabba.

Bólkurin varð settur á stovn, so at menn í Føroyum skuldu hava eitt stað at hittast og fáa hjálp og stuðul frá øðrum í somu støðu.

Bara menn eru limir í bólkinum.

## SAMAN VIÐ ØÐRUM

At vera sjúkur og fáa viðgerð fyri krabbamein kann vera sera tungt og ávirka alla tilveruna. Viðgerðin hevur ofta hjáárin við sær, og sálarliga kann tað eisini vera torført. Tú óttast fyri, hvussu alt fer at ganga, um viðgerðin fer at hjálpa o.s.fr. Hetta eru sera vanligir spurningar.

At hitta menn í líknandi støðu kann gera stóran mun. Okkara royndir vísa, at tað hjálpir at tosa við onnur og seta orð á, og hvør sigur frá sínum upplivingum. Hetta minkar um óttan, og tú fært lættari greiðu á kenslum og tonkum. Lívsmótið og lívsgóðskan økjast, og dagligu avbjóðingarnar verða lættari.



## UM BÓLKIN

Formaðurin í bólkinum tekur stig til fundir og hugnaløtur. Limirnir í bólkinum fáa innbjóðing við telduposti ella sms.

**Tað er ókeypis at verða limur í bólkinum.**

Hevur tú hug at gerast limur í bólkinum, ella hevur tú spurningar viðvíkjandi tilboðunum hjá Krabbameins-felagnum, kanst tú seta teg í samband við okkum við at ringja 317959 ella senda teldubræv til kmf@krabbamein.fo

